tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðadeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Ikki bangin - men sporini ræða!

## *Oddagrein*

Løgmaður mælir nú til at taka seinastu veljarakanningina til eftirtektar. Tað sama ger javnaðarformaðurin, Jóannes Eidesgaard. Kortini sigur Anfinn Kallsberg við Sosialin, at hann fer ikki at halda tí víðgongda Tjóðveldisflokkinum aftur. Men tað verður torført hjá honum bæði at virka fyri eini loysn, sum veljarin tekur undir við, og samstundis halda saman um meiningarnar í samgonguni. Tað ber bart út sagt ikki til, uttan at Tjóðveldisflokkurin slakar í kravinum um fullveldi í næstu framtíð.

Ikki bara henda kanningin, men eisini aðrar eldri kanningar hava víst, at tá fólk hava fleiri møguleikar at velja ímillum, taka fleiri undir við einum øktum sjálvstýri enn við politisku ætlanini hjá landsstýrinum um fullveldi. Hetta má Høgni Hoydal skilja, hóast hann eisini hesaferð klárar at venda úrslitið til, at meiriluti er fyri fullveldi, um tillagingartíðin verður 15 ár.

Fimtan ár! Ja, tað virkar sum eitt langt skotbrá. Og lítið er at ivast í, at skal heildarveitingin lækkast hvørt ár, so fara føroyingar at leggja seg eftir at skapa fleiri inntøkur, fáa meiri burturúr, so minni fer millum skins og hold og laga føroyska samfelagið til okkara egnu fyritreytir og ikki fremmandar. Men tað krevur, at tað føroyska samfelagið fer gjøgnum eina kollveltandi hugburðsbroyting, tí í dag virkar einki. Ikki ein tann einasti av teimum berandi samfelagstættunum virkar, sum hann skal. Alt ber brá av, at amatørar leiða og skipa fyri. Nakrir av teimum yngru stovns- og virkisleiðslunum eru kortini undantøk.

Anfinn Kallsberg heldur, sambært útvarpinum, at fólk eru bangin. Neyvan eru fólk bangin. Heldur er tað politikkurin hjá samgonguni, sum ræðir fólk. Landsstýrið hevur handfarið málini viðvíkjandi Strandferðsluni, fólkaskúlanum, heilsuverkinum, sjónvarpinum, programráðunum o. s. fr. á ein so ónøktandi hátt, at fólk øtast. Tey spyrja seg sjálv, hvussu kunnu vit megna eitt fullveldi, tá vit ikki klára »smámál« sum er? Eisini manipulatiónin við 10 prosentum í búskaparvøkstri fær nógv at seta spurnartekin!

Hóast løgmaður heldur, at veljarakanningin skal takast til eftirtektar, ætlar hann framvegis at brúka sáttmálauppkastið í komandi samráðingum. Men hetta bendir á, at hann framvegis ikki miðjar ímóti eini konstruktivari og breiðari loysn. Skal hann taka áskoðanina hjá veljarum til eftirtektar, má hann broyta samráðingargrundarlag, sum Jóannes Eidesgaard vísti á í Sosialinum í gjár. Tí, heldur Anfinn Kallsberg fram eftir sama leisti, fer endaliga sáttmálauppskotið at fella á eini fólkaatkvøðu. Vit eiga heldur at gera eina avtalu um at lække blokkin og at taka yvir írestandi málsøki í eitt 15 ella 20 ára langt skeið. Við eini slíkari loysn kunnu vit prógva, at vit megna. Megna vit tað, ja, so er vegurin greiður fyri Føroyum sum fullveldisríki, um vit vilja tað tá!

***Sosialurin***

# Hans Pauli fingið riddarakrossin

*Í sambandi við seksti ára føðingardagin útnevndi Margreta drotning nógvar nýggjar riddarar og ein teirra var føroyski listamaðurin Hans Pauli Olsen*

SVEINUR TRÓNDARSON



Fyri nøkrum fáum døgum síðani hevði Margreta drotning føðingardag og í tí sambandi útnevndi hon fleiri nýggjar riddarar.

Teirra millum var ein føroyingur.

Tað var myndahøggarin, Hans Pauli Olsen, sum m. a. hevur gjørt bustur av teimum báðum prinsunum, sum hesaferð var heiðraður við riddarkrossinum av Dannebrog.

Hans Pauli er sera vælumtóktur listamaður, bæði í Føroyum og í Danmark og hevur umframt at gera kongaligar standmyndir, eisini prýtt Listasavn Føroya við síni vøkru list.

Millum teirra, sum hesaferð vórðu útnevnd riddarar, vóru fleiri listafólk og ítróttarfólk. Teirra millum kendi danski sangarin við tí sermerktu røddini, Povl Dissing, og eisini Michael Laudrup, fyrrverandi yrkisfótbóltsleikari.

Ein annar danskur listamaður fekk eisini heiðurin hesaferð og í honum halda føroyingar seg eiga ein part. Tað er filmsleikstjórin Nils Malmros. Ikki skuldi verið neyðugt at sagt hví føroyingar taka sær part í honum ...



*KFUK-fundur í gamla Meinigheitshúsinum í Havn 16. apríl 2000: Rigmor Mortensen, Hanna Danielsen, formaður, Lena Viðstein, Ása Østerø, Emmy Poulsen, Jenny Davidsen, Jona Henriksen, Louisa Niclasen, skrivari, Elsa Davidsen og Bergtóra Jacobsen*

Í sambandi við, at KFUK varð 80 ár 16. apríl, var limafundur hildin í gamla Meinigheitshúsinum í Havn (núverandi býráðssalinum).

Fundurin varð hildin til minnis um fyrsta fundin, sum varð hildin har sama dag í 1920.

– Tað gleddi okkum at fáa loyvi at nýta sama hús, og hesum takka vit býráðsformanninum hjartaliga fyri, sigur Jona Henriksen, fyrrverandi KFUK-skrivari.

# Skrivað álit um mentan í Havn

*Mikudagin handar arbeiðsbólkur borgarstjóranum í Havn álit um mentan og list í Tórshavnar kommunu*

Í nýggja bygnaðinum fyri Tórshavnar býráð er trivnaðardeild skipað sum ein av trimum hvøuðsdeildum í fyrisitingini.

– Ætlanin við deildini er at geva góða tænastu í gerandisdegnum hjá fólki, m. a. við at styrkja mentanararbeiðið í kommununi, sigur Leivur Hansen, borgarstjóri.

– Havnin er høvuðsstaður landsins og hevur skyldu at taka væl ímóti øllum, sum vitja býin, bæði landsmonnum úti um landið og fremmandafólkum, ið koma til Havnar at ferðast ella í ørindum. Ein tann besti mátin er at hava eitt livandi og fjølbroytt mentanarlív við spennandi tilboðum hjá gestum at fara til, sigur borgarstjórin.

Hann sigur víðari, at Havnin fyrst og fremst er heimbýur hjá sínum egnu borgarum og at eitt ríkt frítíðar- og mentanarlív fær fólk at trívast og ger tey virkin í samfelagnum.

Tórshavnar býráð setti í fjør ein arbeiðsbólk at gera álit um mentan og list í Tórshavnar kommunu. Bólkurin fekk víðar ræsur í sínum arbeiði og skuldi gera uppskot og tilmæli, sum kunnu verða støði undir komandi verkætlanum hjá kommununi. Bólkurin er nú liðugur við arbeiði sítt, og mikudagin 26. apríl kl 11 verður álitið handað býráðsformanninum á skrivstovu hansara í býráðshúsinum.

Í bólkinum hava verið Birgir Kruse, formaður, Elsa Jóhanna Høgenni, Jógvan Jensen, Napoleon Nólsoy, Niels Nattestad, Bárður Jákupðsson, Gunnar Hoydal og Jákup Simonsem



*Jón Klein Olsen, útrykningsleiðari*

# Jón útrykningsleiðari

Jón Súni Klein Olsen er frá 1. mai settur sum nýggju leiðari fyri útrykningsdeildini hjá løgregluni í Havn og sum varamaður fyri politiinspektøron fyri Føroyar.

Jón Klein Olsen er 43 ára gamla og var 1. oktober 1993 útnevndur til varapolitikommiser og nú varapolitiinspektør.

Jón Klein Olsen hevur í 1999 lokið prógv sum »Politiets Overordnede Lederuddannelse«.



Ger skjótt av í Keypmannahavn -tak fundarflogfarið



Vanliga fer ein heilur dagur við ferðing, tá farið verður til Keypmannahavnar í snarørindum. Nú vinnur tú dagin innaftur, um tú tekur fundarflogfarið.

Fert tú hósdag, kanst tú arbeiða líka út á seinnapartin og vera í Keypmannahavn um kvøldið. Fert tú sunnudag, kanst tú njóta vikuskiftið í friði og náðum og sita við fundarborðið í Keypmannahavn tíðliga mánamorgun.

Við fundarflogfarinum kanst tú vera aftur í Føroyum 15 1/2 tíma eftir at tú fórt avstað!

Hósdag kl. 17.30
-og koma aftur fríggjadag kl. 7.45 ella 15.15

Sunnudag kl. 17.30
-og koma aftur mánadag kl. 7.45 ella 15.15

SANSIR · TEL 355 355

Atlantic Airways
Vága Floghavn, FO-380 Sørvágur, Tel 333 900, Fax 333 990, e-mail: booking@atlanticairways.fo